Mugu broyta evropeisku kósina

Donsku flokkarnir eru samdir um, at Danmark má broyta kós í evropapolitikki sínum. Ta› ber ikki til, at fólki› er b‡tt í tveir at kalla líka stórar partar

Magnus Dam
Keypmannahavn

53,1 prosent av danska fólkinum vendu fyrradagin donsku stjórnini og øllum teimum stóru flokkunum baki›. Bert 46,9 prosent vístu, at tey hava álit á kósini, sum stóru flokkarnir stungu út í korti› fyri nøkrum mána›um sí›ani. Danmark skal sjálvt skipa síni gjaldoyra- og peningavi›urskifti, seg›i meirilutin.

Men hóast hetta so undurstrika›i Poul Nyrup Rasmussen, at avger›in ikki merkir, at Danmark hevur vent Evropa baki›.

– Vit hava ikki sagt nei til evropeiska samstarvi› í dag, seg›i forsætisrá›harrin.

Hann rætti samstundis hondina út til hinar flokkarnar um eitt betri samstarv um evropapolitkkin í framtí›ini. Poul Nyrup Rasmussen ásanna›i, at ta› ikki er nøktandi, at fólki› stendur so spjatt í sínum sjónarmi›um um evropapolitikkin.
Og hesum eru hinir flokkarnir samdir vi› honum í. Neisí›an harta›i ja-sí›una fyri at ganga einagongd og ikki hyggja eftir, hvørji veruligu ynskini hjá fólkinum eru.

– Hetta er ikki eitt nei til Evropa. Hetta eru eini bo› frá fólkinum til donsku stjórnina og stjórnirnar í hinum ES-londunum um, at fólki› vil hava ávirkan á gongdina, seg›i stóri sigursharrin, Holger K. Nielsen, tá i› hann sigurssælur kom inn á Christiansborg fyrradagin. Vinstra og socialdemokratarnir eru samdir um, at Danmark í framtí›ini skal arbei›a fyri at fáa eitt grei›ari uppgávub‡ti í ES. Hvat skal ES rá›a yvir, og hvat skulu einstøku londini rá›a yvir.

– Ta› er greitt, at fólki› hevur lagt dent á, at vit finna eitt greitt uppgávub‡ti, og ta› fara vit so at arbei›a fyri, seg›i Poul Nyrup Rasmussen, sum samstundis tók á seg høvu›sábyrgdina fyri, at evran var› vraka› av fólkinum.

Holger K. Nielsen gjørdist stóri sigursharrin á evruvalinum hósdagin. – Hetta var fólksins sigur, seg›i floksforma›urin hjá SF, sum fekk ein stóran koss, tá i› hann kom inn á Christiansborg eftir sigurin

Status Quo í Danmark

Stø›an í Danmark er óbroytt, eftir at ein meitluti valdi krónuna fram um evruna í gjár. Krónan er framvegis áliti›, og fíggjarmarkna›irnir hava í dag víst, at teir hava álit á krónuni

Teir taptu. Teir fimm stóru ja-flokkarnir vór›u vraka›ir av fólkinum fyrradagin og mugu taka á seg ábyrgdina fyri ósigurin. Nú er stundin komin til sjálvrannsakan

Magnus Dam
Keypmannahavn

Fíggjarmarkna›irnir hava ikki revsa› Danmark, sum í gjár vísti sítt misálit á felags-evropeiska gjaldoyra› evruna. Krónan er styrkt naka› í morgun, og vir›isbrøvini standa naka› sterkari í dag enn í gjár.

Fíggjarmálará›harrarnir í teimum 11 evru-londunum hava allir roynt at vísa á, at stø›an sum so ikki broytir naka›. Danmark var uttanfyri í gjár, og landi› er framveigs uttanfyri evru-samstarvi›. Vit fara ví›ari vi› okkara ætlanum, siga fíggjarmálará›harrarnir.

Danska stjórnin og Tjó›bankin vóru í gjár skjót at gera vart vi›, at danska krónan skal verjast móti gjaldoyraspekulantum.
Tjó›bankin fer ikki at loyva krónuni at koma undir tr‡st. Til tess at visa umheiminum, at álvari liggur aftanfyri or›ini, hækka›i Tjó›bankin í morgun útlánsrentuna eitt hálvt prosentstig. Hetta var› millum anna› gjørt fyri at vísa umheiminum, at Tjó›bankin hevur ney›ugu styrkina til at verja krónuna.

Hildi› ver›ur ikki, at ney›ugt er hjá stjórnini at seta nøkur búskaparlig tiltøk í verk, eftir avger›in í gjár. Bæ›i Mogens Lykketoft, fíggjarmálará›harri, og Marianne Jelved, búskaparmálará›harri, siga, at ongar ætlanir eru um búskaparlig inntriv.

Donsku blø›ini geva Nyrup av grovfílini fyri úrsliti› av fólkaatkvø›uni fyrradagin

Nyrup fær skyldina

Donsku blø›ini geva forsætisrá›harranum skyldina av úrslitinum hósdagin

Magnus Dam
Keypmannahavn

Ta› eru ikki blí› or›, i› forsætisrá›harrin fær í oddagreinunum í donsku blø›unum eftir ósigurin hósdagin. Nyrup var› vraka›ur av fólkinum, skriva blø›ini.
Jydske Vestkysten skrivar, at atkvø›ugrei›slan í stóran mun kom at snúgva seg um trúvir›i› hjá forsætisrá›harranum. Og tí var ta› ein taparasak frá byrjan til enda, skrivar bla›i›.

Nyrup skjeyt seg sjálvan í fótin á ein sovor›nan hátt, at áliti› frá veljarunum er fari›, skrivar Århus Stiftstidende. Information skrivar, at avger›in hósdagin vísir hvussu átro›kandi ta› er at fáa eitt djúptøkt kjak í lag um ES og danska leiklutin í ES, skrivar Information.

Berlingske Tidende samanber stø›una hósdagin vi› stø›una í 1992, tá i› danir somulei›is søgdu nei.

– Høvdu Nyrup og Jelved hátta› sær ø›rvísi og ikki á sama hátt sum Schlüter og Uffe Ellemann í 1992, so hev›i stø›an veri› ein onnur í dag. Tey bæ›i settu seg upp ímóti fólkinum, og forsætisrá›harrin hevur gjørt sjálvmál, líka sí›ani valstrí›i› um evruna byrja›i, skrivar bla›i›.

Flestøll onnur blø› eru samd um, at forsætisrá›harrin má taka í egnan barm og síggja i eyguni, at hann og kósin hjá honum hava ábyrgdina av, at danir søgdu nei.

Eisini Aktuelt, i› annars er vinarliga sinna› mótvegis stjórnini gevur ja-sí›uni ábyrgdina. Bla›i› skrivar, at skal stø›an nakrantí› gerast ø›rvísi, so má misáliti› hjá fólkinum mótvegis ES vi›gerast á ein heilt annan hátt enn higartil.

Prodi harmast

Forma›urin í ES-nevndini, Romano Prodi, harmast um, at danir atkvøddu nei. Men hur›in stendur framvegis opin fyri danskari luttøku í evru-samstarvinum

Magnus Dam,
Keypmannahavn

Romano Prodi harmast saman vi› restini av ES-nevndini um úrsliti› av atkvø›ugrei›sluni í Danmark.

– Donsk luttøka í evrusamstarvinum hev›i gagna› bæ›i Danmark og ES. Men danska avger›in broytir kortini ikki stø›una hjá Danmark í ES, sigur hann vi› Jyllands Posten.

Romano Prodi leggur afturat, at danska avger›in ikki n‡tist at ver›a tann endaliga.

– Ta› kundi veri› áhugavert at vita, hvussu ta› hevur ávirka› valúrsliti› í dag, at danir vistu, at teir kanska fáa ein møguleika at atkvø›a um evruna einafer› afturat seinni.

– Eingin hevur útih‡st Danmark. Hur›in stendur opin, seg›i ES-nevndarforma›urin.

Romano Prodi seg›i, at atkvø›ugrei›slan fer ikki at broyta stø›una hjá Danmark í ES. Avger›in í dag inniber bert eitt framhald av verandi stø›u, har Danmark stendur uttanfyri gjaldoyrasamstarvi›.

Danski Tjó›bankin tekur somulei›is avger›ina til eftirtektar.

– Tjó›bankin fer framvegis at síggja til, at vir›i› á krónuni ikki fer ov langt frá vir›inum á evruni, eins ov vit hava gjørt sí›ani 1. januar 1999, og sum vit á›ur hava gjørt vi›víkjandi D-markinum.

– Ta› er avgerandi, at hendan gongdin heldur fram óbroytt, sigur Bodil Nyboe Andersen, tjó›bankastjóri vi› Jyllands Posten.

Framhald frá síðu 5

Palle Bager legði lag á



Í 1937 keyptu tey sethús í Lucas Debesargøtu og um somu tíð fingu tey ein sáttmála við Mr. Brend, um at leiga hornið Kongagøta / Niels Finsensgøta, men tá tey vóru uppsøgd í 1942, máttu tey flyta handilin til sethúsini í Lucas Debesargøtu. Longu frá byrjan sum handilsmaður fór hann undir at gera og selja ís. Palle Bager legði honum lag á hvussu ísur bleiv gjørdur, men hann eksperimiteraði við uppskriftini, so hann kom fram til eina uppskrift, sum var sera vælsmakkandi. Eldri fólk í Havn minnast sikkurt ísin hjá Johannes Andreasen.

Seldi ís uttan fyri hjá Hans Joensen

Tá kríggið varð av í 1945, kom útlongsulin í hann aftur. Tey seldu sethúsini í L. Debesargøtu og fluttu til Keypmannahavn, har tey royndu seg við handili, men ikki mundi gangast so væl, tí longu í 1947 komu tey heim aftur til Føroyar.

Vertrarhálvárini ferðaðist hann sum sølumaður fyri heilsølur í Havn. Summarhálvárini seldi hann ís uttanfyri hjá Hans Joensen í N. Finsensgøtu, og í 1950 læt hann so handilin á Grønlandsvegnum upp, sum nú verður drivin av triðja ættarliði. Johannes Andreasen doyði í 1968. Hjørdis Andreasen doyði í 1984.

Fóm Ísterta 4 ymisk sløg	**21,95**
Gott og blandað Salt og Blandað 265 g	**19,95**
OMO vaskipulvur 1,8 kg	**24,95**
Swan hveitimjøl 1,5 kg	**11,95**
Libero blæður dupultir pakki	**144,95**
Kit kat pakki við 3 stk.	**9,95**
Smarties pakki við 3 stk.	**12,95**
Ajax reingerð 1250 ml.	**24,95**

Í sambandi við 50 ára føðingardagin, leygardagin 30. september, letur handilin aftur kl. 14.00. Vit lata hurðarnar upp aftur kl 15.00 og bjóða til móttøku, við ábiti og klassiskum tónleiki, fram til kl. 17.00. Vælkomin

Keypmaðurin "úti í Grønlandi"

Pf. Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16

50 ár

stephanssons hús